Djóni Nolsøe Joensen **Nr. 55/2019**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini §52 a

Fyrispurningur viðvíkjandi GPS tænastum, settur landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS §52 a)

1. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hví prísstøðið á landsumfatandi GPS tænastum, sum m.a. byggivinnan brúkar í sínum virksemi, verður so høgt, sum boðað er frá av Umhvørvisstovuni?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at gera nakað við høgu gjøldini?

Viðmerkingar:

Seinastu árini er tað blivið meira og meira vanligt at brúka GPS skipanir í m.a. byggivinnuni fyri at røkka betri og neyvari úrslitum. Ja, so líðandi er hetta við GPS skipanum blivið meira ella minni eitt krav frá fleiri ráðgevum og byggiharrum kring landið; eisini almennum. Nógvar størri og minni fyritøkur hava lagað seg til hesi krøv og hava brúkt nógvan pening til íløgur fyri at kunna fylgja við krøvunum.

Í eina tíð hava føroyskar fyritøkur keypt tænastuna frá einum privatum, donskum veitara, men síðani er Umhvørvisstovan (US) farin undir at veita tænastuna ókeypis í eina royndartíð. Hetta hevur havt við sær, at danski veitarin, sum hevur veitt tænastuna fyri ein rímiligan prís, hevur valt at gevast. Í einum telduposti til fyritøkur, sum nýta GPS tænastur, boðaði US fyrst í desember mánaði frá, hvar prísstøðið kemur at liggja, tá ókeypis royndartíðin er av. Talan er um eitt prísstøði, sum er fleiri ferðir hægri enn tað, ið privatu donsku veitararnir kundu bjóða. Fíggjarliga er tað sera dýrt at arbeiða við GPS skipanum, serliga hjá teimum smærru fyritøkunum, og tí verður tað sum steinur oman á byrðu, um US fer at krevja so stór gjøld fyri GPS tænastur, sum teir hava boðað frá.

GPS tænasturnar eru neyðugar í framtíðarbygging av vegum og bygningum, og tí er tað av sera stórum týdningi fyri m.a. byggivinnuna, at tænasturnar ikki hava nakran okurskostnað við sær. Serliga um tað almenna skal vera veitarin. Tá er stórur vandi fyri, at fyritøkur fara at velja at lata vera við at menna seg tøkniliga orsakað av kostnaðinum. Og soleiðis lata ivasamari úrslit frá sær enn brúk er fyri. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 24. februar 2020

Djóni Nolsøe Joensen